# Mourinho lagdur undir harðskap

Sum um tað ikki var nóg mikið, at Inter var sligið út úr Champions League-kappingini av Manchester United týskvøldið, so verður Inter-venjarin, José Mourinho, nú skuldsettur fyri at hava lagt á ein Inter-fjeppara eftir dystin. Hetta skal vera hent í nánd av spælarabussinum uttan fyri Old Trafford, og politiið í Manchester váttar, at tilburðurin er meldaður.



# HM-talvfinalan neyvan í ár

Hóast Veselin Topalov við sigri á Gata Kamsky í hálvfinaluni júst hevur vunnið sær pláss í finaluni um heimsmeistaraheitið í talvi, sum skuldi verða í september í ár ímóti VisWanathan Anand, hevur altjóða talvsamgongan, FIDE, nú sátt iva um, nær finalan kann vera. Sum skilst, er penganeyð orsøkin til, at FIDE fyribils hevur útsett finaluna til síðst í apríl mánaði næsta ár.

# Sophus frá sum landsliðsvenjari

**– Eg havi annað at takast við, enn at kjakast í fjølmiðlunum, tí hetta átti heldur at snúð seg um hondbólt, sigur Sophus Dal-Christiansen, sum millum annað vísir á, at kvinnurnar, sum hava skrivað undir skrivini til Hondbóltssambandið, heldur ikki eru tær, ið ganga undan á vøllinum**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Sophus Dal-Christiansen hevur í morgun boðað Hondbóltssambandinum frá, at hann tekur seg aftur sum venjari hjá kvinnulandsliðnum. Í longri tíð hava fleiri av spælarakvinnunum víst misnøgd við hansara arbeiði sum venjari, men av tí at henda misnøgd hevur verið víst í fjølmiðlunum, hóast hetta skuldi verið eitt innanhýsis mál, hevur Sophus valt at takkað fyri seg.

– Eg havi annað at takast við, enn at kjakast í fjølmiðlunum, tí hetta átti heldur at snúð seg um hondbólt. Sjálvur haldi eg, at skuldsetingarnar, sum nakrir av landsliðsspælarunum hava sett fram ímóti mær, einki hava við hondbólt at gera, sigur Sophus.

– Eisini haldi eg tað vera ov vánaligt, at spælararnir, sum hava skrivað undir, ikki tora at standa fram við navni í fjølmiðlunum. Somuleiðis kann eg staðfesta, at eg havi havt Hondbóltssambandið aftan fyri meg alla tíðina.

Til tað siga landsliðskvinnur, Sosialurin hevur tosað við, at tær ynskja ikki alment at leggja navn til atfinningarnar, tí tær stúra fyri avleiðingum, ið kunnu líkjast teimum, ið raktu Heina Hanusarson og aðrar á manslandsliðnum í heyst.

– Men vit eru ikki meira dulnevndar enn so, at vit hava skrivað undir hasi brøvini, so í øllum førum veit Hondbóltssambandið, hvørjar vit eru, siga landsliðskvinnurnar.

## Onga heimild

Sophus Dal-Christiansen vísir víðari á, at nógvir av spælarunum, sum hava skrivað undir skrivini til Hondbóltssambandið, í grundini slett ikki hava nakra veruliga heimild til at skriva undir.



*Sophus Dal-Christiansen hevur í morgun boðað Hondbóltssambandinum frá, at hann tekur seg aftur sum venjari hjá kvinnulandsliðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

– Her er ikki talan um teir spælarar, sum standa í fremstu røð á vøllinum, tá harðast leikar á. Og okkurt dømi um spælarar, sum geva avboð til níggju av 10 venjingum, sigur nú fráfarni landsliðsvenjarin.

– Viðvíkjandi innihaldinum í skrivinum, tær hava sent Hondbóltssambandinum, so standi eg bæði undrandi og spyrjandi, tí einki hald er í tí og haraftrat fleiri villur. Millum annað hava tær skrivað, at eg skal vera tann fyrsti til at missa høvdið undir dysti, men millum teirra, ið hava skrivað undir, eru fleiri spælarar, sum ongantíð hava verið í dysti saman við mær.

Sophus harmast um støðuna, sum fyrst og fremst gongur út yvir kvinnulandsliðið. Hann væntar, at tað einasta, ið misnøgdu kvinnurnar nú fáa burtur úr hesum málinum, er at kvinnulandsliðið verður »lagt á hillina« í eina tíð. – Og eisini tá kemur hondbólturin at standa eftir sum taparin, sigur hann.

## Venjingin avlýst

Forsøgan er tann, at miðskeiðis í januar mánaði skrivaði ein stórur partur av kvinnulandsliðnum undir eitt skriv til Hondbóltssambandið, har kvinnurnar kravdu, at tær fingu ein nýggjan landsliðsvenjara í staðin fyri Sophus Dal-Christiansen, sum tær vóru alt annað enn nøgdar við.

Hondbóltssambandinum bað tá um at fáa eitt nýtt skriv, har ein grundgeving skuldi fylgja við. Tær hittust síðani á fundi tann 26. januar og festu nakrar grundgevingar á blað, sum vóru ein lemjandi kritikkur av venjaranum.

– So væntaðu vit, at Hondbóltssambandið gjørdi okkurt, men har hendi einki. Hóast okkum var lovaður ein fundur, tá landsliðsvenjing var í Kollafirði mitt í februar, so var eingin fundur. Í staðin fingu vit so enn eina ferð lyfti um, at fundur skuldi verða, tá landsliðið nú aftur skuldi koma saman á Eiði, siga landsliðsspælarar við Sosialurin.

Men nú verður so eingin landsliðsvenjing á Eiði, tí kvinnulandsliðið hevur ongan venjara meira, og nú Sophus sjálvur hevur lagt frá sær, er ætlaði fundurin neyvan heldur serliga aktuellur júst nú.

Vit fingu fyrrapartin fatur í formanninum í Hondbóltssambandinum, Kristian Johansen, sum var staddur í Keypmannahavn, men hann kundi onga viðmerking gera til málið, tí hetta var so nýtt og tí hann ikki hevði tosað við allar partar enn.

– Men eg komi aftur sunnudagin, og mánadagin fara vit at hava fund um málið sigur hann.

# Fyrireika seg til Sveis

**Mikudagin spælir føroyska manslandsliðið í hondbólti EM-undankappingardyst ímóti Sveis, og mánakvøldið verður greitt, hvussu endaligi hópurin sær út**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Dia Midjord og Kári Nielsen, landsliðsvenjarar, skulu brúka venjingarnar næstu dagarnar til at finna útav, hvørjir 12 útispælarar og tveir málmenn verða í endaliga hópinum, sum verður tikin út til teir báðar dystirnar í EM-undankappingini ímóti Sveis. Tann fyrri verður í Havn mikukvøldið klokkan 19 og tann seinni niðri í Zürich næsta leygardag.

Enn er talan bara um ein bruttohóp, sum er til venjingarnar, og ikki allir, sum eru við har, sleppa við. Allir í bruttohópinum eru heldur ikki tøkir enn, tí Heini Hanusarson kemur ikki til Føroya fyrr enn sunnudagin ella mánadagin, men lítið annað man vera væntandi, enn at hann verður partur av endaliga hópinum, hóast hann ikki hevur verið til allar venjingarnar.

Landsliðið fer í kvøld at venja í Kollafirði, sunnudagin verður vant í Hoyvíkshøllini, og mánadagin og týsdagin verður so tað síðsta fingið upp á pláss í høllini á Hálsi í Havn, har eisini heimadysturin ímóti Sveis skal spælast.

Bruttohópurin, sum telur 18 mans, sær soleiðis út: Finnur Hansson, Tróndur Kragesteen, Karl Herup Olsen, Ingi Olsen og Ári Dam úr Neistanum, Janus Sørensen, Regin Joensen, Esbern Patursson, Johan Hofgaard og Levi Nybo úr H71, Áki G Olsen, Agnar Joensen, Sámal Joensen og Rúni Joensen úr VÍF, Hans Áki Dal-Christiansen og Bárður Johannesen úr Kyndli, Heini Hanusarson úr Ajax Keypmannahavn og Lars L. Black úr ÍF Føroyum.



*Heini Hanusarson er aftur klárur til hondbóltslandsliðið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*